# Neyðugt verður ikki longur at kílaskera



*Við nýggju flakalinjuni, sum "nappar" beinini úr flakinum, verður ikki neyðugt at standa og kílaskera longur. - Jú, betri tøknin er, tess meira lønandi verður framleiðslan, sigur Guðjón Stefanson*

**Fyri tveimum árum síðan fekk íslendska fyritøkan, Marell, til uppgávu at byggja eina flakalinju, har beinini verða "nappað" úr flakinum, samstundis sum kílin situr eftir. Síðan verða fløkini lýst ígjøgnum við røntgen. - Hetta er ein verkætlan, sum kostar 34 milj. norskar krónur og er samstundis okkara størsta einstaka uppgáva, sigur varastjórin í Marell, Guðjón Stefansson**

NÝGGJ TØKNI
*Vilmund Jacobsen*

Ein av uppgávunum, sum fyritøkan Marell í Íslandi arbeiðir við, er umbiðin úr Lofoten í Noregi. Hetta er ein sera áhugaverd uppgáva og ein stór avbjóðing hjá íslendska framleiðaranum av útbúnaði til fiski-og alivinnuna.

Trupulleikin hjá norðmonnum er, at nógvur fiskur, sum norsk skip fiska, endar í Kina, har hann verður framleiddur í kapping við eitt nú norsk virki. Arbeiðslønin í Kina er lág í mun til arbeiðslønina í Noregi, og tí er umráðandi hjá norðmonnum, at ikki ov nógvir arbeiðstímar verða brúktir uppá framleiðsluna.

Talan er í hesum førinum um beinfría flakaframleiðslu, har umráðandi eisini er, at úrtøkan er so stór sum tilber.

Framleiðarar í Lofoten vilja hava Marell at byggja eina flakalinju, har beinini í flakinum verða burturbeind – ikki av reinskerarum við eitt reinskeriborð, sum vit vanliga kenna tað, men við eini maskinu, sum "nappar" beinini úr flakinum.

Á henda hátt sparir virkið nógvar tímalønir og við tað, at kílin ikki verður skorin burtur, verður úrtøkan eisini størri.

### Stór verkætlan

Guðjón Stefansson, varastjóri hjá Marell í Íslandi, sum hevði felags bás við formula.fo á North Atlantic Fish Fair, sigur, at felagið fekk áheitanina úr Lofoten um at byggja hesa flakalinju fyri tveimum árum síðan. Marell avgjørdi at fara undir hetta arbeiði í samstarvi við donsku fyritøkuna, Carnetec.

- Vit fingu tvey ár um at gera hetta arbeiði, sum er ein stór verkætlan uppá einar 34 milj. norskar krónur. Hetta er samstundis størsta einstaka uppgáva, sum vit hava fingið litið upp í hendur, sigur Guðjón.

Norska vinnulívið stuðlar verkætlanini við helminginum av kostnaðinum.

Nýggja maskinan er eisini útgjørd við røntgen, soleiðis at staðfestast kann, um bein sita eftir í flakinum, tá ið tey eru farin ígjøgnum "napparan".

Guðjón sigur, at tvær maskinur í løtuni verða royndarkoyrdar. Tann eina hevur verið virkin í 8 mánaðir, hin í hálvan annan mánaða.

- Maskinurnar koyra ógvuliga væl, og hetta sær ógvuliga áhugavert og spennandi út.

Hann sigur, at enn skulu nakrar ábøtur gerast á skipanina, har beinini verða nappað úr flakinum, men røntgen-skipanin virkar fult og heilt sum ætlað.

### Størri úrtøka

Eitt av málunum við nýggju maskinuni, sigur Guðjón Stefansson er, at útrøkan verður so stór, sum tilber.

- Í vanligari flakaframsleiðslu fara eini 8% av flakinum til fars, men málið hjá okkum er, at einans 2-3% skulu fara til fars, tá ið maskinan roynist so væl, sum vit vilja hava, at hon skal gera.

Nýggja maskinan er serliga ætlað til flakaframleiðslu av toski og hýsu.

Guðjón vísir til eina nýggja kanning, sum kenda handilsketan, Mark & Spenser, hevur gjørt.

Fyritøkan hevur spurt síni viðskiftafólk um fyrimunir og vansar við at eta fisk.

Svarini býta seg í fimm bólkar, harav nr. 1 er, at fiskur er heilsugóður. Í øðrum triðja og fjórða føri tosa fólk um bein – og í fimta og seinasta føri um prísin.

- Tískil halda fólk sum heild, at fiskur er heilsugóður, men trupulleikin er beinini. Eftir øllum at døma er prísurin ikki tað, sum fólk hanga seg mest í.

Guðjón vísir á, at fólk hanga seg nógv í beinini.

- Í fyrsta lagi, at bein er í fiskinum, í øðrum lagi, at torført er at skilja beinini burtur úr og í triðja lagi, at fólk bera ótta fyri at seta beinini í hálsin.

Varastjórin í Marell sigur, at hesi úrslit vísa, hvussu stóran týdning tað hevur, at fiskurin, sum fer út á marknaðin, veruliga er beinfríur.

- Tí hava vit eina stóra uppgávu við hesi nýggju linjuni, sum nú er við at verða undir landi.

Guðjón Stefansson væntar, at nýggja og framkomna flakalinjan verður endaliga liðug til heystar.

- Jú, betri tøknin er, tess meira lønandi verður framleiðslan, sigur hann at enda.



*Ein nýggj flakalinja, sum "nappar" beinini úr fiskinum og letur kílan sita eftir, verður nú royndarkoyrd. Á North Atlantic Fish Fair hevði Sosialurin samrøðu við varastjóran hjá íslendsku fyritøkuni, Marell, sum í Føroyum hevur neyvt samstarv við formula.fo*

*Mynd: Jens Chr. Vang*



# Marell í Íslandi rósar formula.fo til skýggja

**- Formula.fo er okkara umboð í Føroyum, og felagið er ein ógvuliga dugnaligur samstarvsfelagi, sum leggur stóran dent á tøkni, sølu og tænastu. Varastjórin í kendu íslendsku fyritøkuni, Marell, sigur, at formula.fo hevur eitt sera gott forstáilsi fyri nýggjari tøkni og stuðlar uppundir tær loysnir, sum Marell byggir upp í Føroyum**

TØKNI OG SAMSTARV
*Vilmund Jacobsen*



*Umboð fyri Marell í Íslandi og formula.fo í Føroyum á felags básinum hjá fyritøkunum á North Atlantic Fish Fair.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á altjóða fiskivinnu-og alistevnuni, North Atlantic Fish Fair, sum hildin varð í síðstu viku, høvdu formula.fo og Marell í Íslandi, stóran felags bás.

Marell er ein kend íslendsk fyritøka, sum framleiðir ymiskan útbúnað til fiski- og alivinnuna, bæði á sjógvi og landi. Fyritøkan arbeiðir alla tíðina við at menna framleiðslutólini, soleiðis at tey gerast effektivari og betur. Marell átekur sær eisini at fremja loysnir eftir ynskjum hjá teimum, sum starvast í vinnuni.

### Eitt kent navn

Tey, sum hava vitjað á altjóða fiskivinnustevnum uttanlands, hava uttan iva lagt til merkis, at navnið, Marell, hevur verið afturvendandi í mong ár – á ymiskum økjum innan framleiðslutól.

Men Marell er eisini ein kend fyritøka í Føroyum. Eingin virkisleiðari ella skipaeigari kann siga, at hann ella hon ikki kenna hetta navnið.

Íslendska fyritøkan hevur bygt upp stórar framleiðslu- og pakkilinjur í Føroyum, og tvey av teimum seinastu stóru projektunum eru sett upp á Fiskamarknaði Føroyum á Toftum og í Klaksvík og hjá laksavirkinum, P/F Kryvjing í Klaksvík.

Tað eru fá virkir og alistøðir í Føroyum, har Marell ikki hevur havt ein fingur við í spælinum – antin so ella so.

Men Marell er ikki einsamalt í Føroyum um hesar uppgávur. Fyritøkan hevur neyvt samstarv við formula.fo og eisini við NomaTek, sum hava verið við til at bygt upp fleiri av teimum skipanin, sum settar eru upp í Føroyum.

Uppgávan hjá formula.fo er í hesum sambandi at útbyggja nútímans tøknina omanyvir tær skipanir og stýringar, sum Marell ger.

Marell er sera fegið um samstarvið við formula. fo, og íslendingar siga, at føroyska fyritøkan er ógvuliga frammarliga á sínum øki.




*Felags básurin hjá formula.fo og Marell.*

*Mynd: Jens Chr. Vang*

### Rós til formula.fo

Á felags básinum hjá formula.fo og Marell, hittu vit varastjóran í íslendsku fyritøkuni, Guðjón Stefansson, sum var fryntligur bæði í orð og tal.

Hann sigur, at samstarvið við formula. fo og felagið, sum formula. fo er sprottið úr, røkkur nógv ár aftur í tíðina.

- Formula.fo er okkara umboð í Føroyum, og felagið er ein ógvuliga dugnaligur samstarvsfelagi, sum leggur stóran dent á tøkni, sølu og tænastu.

Guðjón leggur dent á, at føroyska fyritøkan hevur eitt sera gott forstáilsi fyri nýggjari tøkni og stuðlar á fleiri økjum uppundir tær loysnir, sum Marell byggir upp í Føroyum.

- Formula.fo byggir sína vitan og sína tøkni oman yvir okkara, sigur hann.

Varastjórin sigur, at formula.fo er tann samstarvsfelagin, sum hevur eina ta størstu vitanina innan tøkni á fleiri økjum.

Spurdur, um Marell ikki finnur somu teknisku ekspertisu í Íslandi, sum formula.fo hevur í Føroyum, sigur Guðjón Stefansson, at tilsvarandi feløg í Íslandi arbeiða ikki á sama hátt sum formula.fo.

- Tað verður ógvuliga trupult at finna ein meira dugnaligan samstarvsfelaga enn formula.fo, sigur varastjórin hjá Marell í Íslandi.

Marell hevur eini 30 dóttirfeløg runt um í heiminum.